## Katholt selt á uppboðssølu

Heimstaðurin hjá Emil úr Lønnibergi, Katholt, verður í morgin seldur á uppboðssølu í Havn. Pallsetingin til stórsligna og væl umtókta leikin hjá Klaksvíkar Sjónleikarfelag verður fríggjadagin seld hægstbjóðandi. - Vit hava ikki umstøður at goyma hendan stóra pallin, og tí hava vit gjørt av at selja hann, sigur Rudolf Joensen, formaður í Klaksvíkar Sjónleikarfelag. Møguleiki er at keypa alla pallsetingina, um áhugi er fyri tí, men Klaksvíkar Sjónleikarfelag er eisini sinnað at selja pallin í pørtum. - Nú gongur einki serligt við húsasøluni í Føroyum, men vit rokna við, at vit fáa selt húsið í Katholt, men eg dugi illa at meta um, hvat vit kunnu fáa fyri tað, sigur Rudolf Joensen. Seinasta sýningin av Emil úr Lønnibergi verður í Norðurlandahúsinum sunnudagin, men longu fríggjadagin klokkan 15.00 verður uppboðssølan av pallinum í Norðurlandahúsinum í Havn.



## Deyðarevsing fyri eitraða mjólk

Dómsvaldið í Kina viðger í hesum døgum fleiri rættarmál í sambandi við gøluna, tá umleið 300.000 kinesisk smábørn gjørdust sjúk av eitraðari pulvurmjólk. Minst seks av børnunum doyðu. Ein rættur í Shijiazhuang har norðuri í landinum hevur dømt ein mann til deyða fyri hansara lut í gøluni, og tveir aðrir fingu lívlanga fongsulsrevsing. Zhang Yujun, sum fekk deyðarevsing, var stjóri á einum virki, sum gjørdi evnið melamin. Tað var hetta evnið, sum bleiv funnið í mjólkarpulvurinum, og sum eitraði børnini.



# Ein dáragerð

**Enn er einki at frætta um støðuna hjá Tilhaldinum í Havn. Borgarstjórin roynir at finna neyðugu pengarnar til raksturin av húsinum, og er skuffaður av Løgtinginum, sum hevur samtykt at skerja játtanina til tilhaldini kring landið. Hetta er ein dáragerð, sigur hann**

ELDRAØKI
*Eilen Antoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

- Vit eru ikki enn komin til nakra niðurstøðu viðvíkjandi Tilhaldinum í Tórsgøtu. Málið var fyri á samgongufundi týsdagin, og vit arbeiða hvønn dag við málinum, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu.

Ein avleiðing av sparing á fíggjarlógini hevur við sær, at Tilhaldið í Tórsgøtu er hótt og helst noyðist at lata aftur, um játtan ikki verður funnin til raksturin av húsinum. Tískil vendu brúkarar av Tilhaldinum sær til Tórshavnar býráð týsdagin, tá fyrsti samgongufundur var í býráðnum. Við sær høvdu tey 100 undirskriftir frá brúkarum hjá Tilhaldinum.

Heðin Mortensen sigur, at talan í minsta lagi er um hálva millión, sum skal finnast. Við vanligum viðlíkahaldi kemur upphæddin skjótt upp á heila millión.

- Vit royna at finna eina loysn. Møguliga skulu nøkur ting umskipast fyri at bjarga Tilhaldinum. Enn er ov tíðliga at siga nakað, men í øllum førum skal málið í fíggjarnevndina, tá tað fer her frá, sigur hann.

Borgarstjórin leggur afturat, at málið verður tikið í álvara í býráðnum, og tað at pensionistar møttu so fjølment upp til fundin, var bara gott. Tað vísir at fólk eru góð við húsið.

Hann letur tó ongan iva vera um at hann er vónbrotin av avgerðini hjá løgtinginum um at fremja hesa sparingina.

- Hetta er ein dáragerð, sum løgtingið hevur framt. Hetta er so óprofessionelt, at kommunurnar ikki so frægt sum eru eftirspurdar í málinum. Og tað er alt løgtingið, ið stendur aftanfyri hetta.

- Og hetta rakar allar kommunur. Hava vit ikki tilhaldini opin, gongur tað út yvir alt eldraøkið, sum tað er, og tørvurin á røktarheimsplássum kemur bara enn skjótari. Hetta fer at bíta seg aftur í hælin, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri.




*Partabrævakursirnir hjá Sydbank upplivdu stóra hækking í morgun*

Partabrøv:

## Bankar upp – ítróttur niður

**Danski partabrævamarknaðurin er á veg upp eftir í morgun, og C20 indeksið lá á miðdegi til eitt pluss á 1,1%**

PARTABRØV
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað er reiðaríið Norden, sum liggur klárt á odda og hækkar 6,5%, meðan eisini donsku banka partabrøvini standa seg væl.

Banka partabrøvini hava sett inn ein spurt fyri at finna aftur stóru partabrævafallini, sum eru ein avleiðing av fíggjarkreppuni.

Í C20- indeksinum liggja Sydbank partabrøvini til eina hækking á 3,7%, meðan Nordea og Danske Bank eisini eru á pluss og hækka ávikavist 3% og 2,7%.

### Bankar væl fyri

Uttan fyri elituindeksið (C20) eru partabrøvini eisini hækkandi hjá Fionia Bank og Amagerbanken. Her er talan um ávikavist 11,4% og 8,8% hækking. Harvið smittar tað av á donsku bankarnar, at amerikanski fíggjarsektorurin er í pluss eftir fráboðanina um enn ein hjálparpakka til amerikanska fíggjarsektorin.

Á amerikanska partabrævamarknaðainum upplivdu fíggjarpartabrøvini í gjár størstu hækkingina í tveir mánaðir. Tað hendi eftir at nýggi amerikanski fíggjarmálaráðharrin, Timothy Geitner, boðaði frá, at innan fyri næstu tvær vikurnar kemur eitt uppskot um ein umfatandi hjálparpakka, fyri at bøta um búskaparligu og fíggjarligu kreppuna.

### Parken í fríum falli

Mest fallandi partabrøvini eru at finna hjá Viborg Håndbold og Parken Sport og Entertainment. Hondbóltsfelagið fall við 14% eftir, at felagið aftan fyri í dag niðurjusteraði metingarnar til úrslitið fyri roknskaparárið 2008/2009.

Hondbóltsfelagið hevði framman undan roknað við einum umsetningi upp á umleið 57 milliónir krónur og eitt úrslit áðrenn skatt eitt stað millum pluss og minus eina millión krónur. Men millum annað ein svíkjandi sponsor umsetningur hevur ført til, at tað nú verður roknað við reyðum tølum á botnlinjuni eftir skatt upp á minus 2,5-3,5 milliónir krónur.

Eisini Parken partabrøvini hava fingið ein avsmurning og fullu í dag 12,2% Tað hendir eftir at grannskoðarar í Berlinske Tidende í dag hava sátt iva um, hvørt felagið hjá Don Ø hevur styrkina at standa ímóti fíggjarkreppuni.

Grannskoðararnir óttast risastóru skuldina hjá felagnum og eru ræddir fyri, at tað fer at verða trupult at útvega nóg nøgv gjaldføri til at gjalda rentur og avdrøg á dýrum lánum, skrivar danska heimasíðan boersen.dk.